# Elttør vísir søgunum aftur




*Hjalgrím Elttør hevur roynst væl í havnarfelagnum í ár*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FÓTBÓLTUR Norðlýsið skrivar á sínari heimasíðu, at Hjallgrím Elttør er á veg til KÍ. Hjallgrím Elttør vísir leysasøgunum aftur**

Súni Clementsen, praktikantur

– Tað er einki hald í hasum, annars havi eg ongar viðmerkingar, sigur hann.

Jóhann Lutzen, stjóri í Sp/f KÍ, hevði heldur ikki viðmerkingar til søgurnar, tá Norðlýsið spurdi hann mikudagin.

Hjallgrím Elttør skifti úr KÍ og í B36 undan kappingarbyrjan í ár. Hann hevur áður spælt við Fremad Amager og NSÍ.

# Landsliðini venja

Eingin landskappingardystur er í bestu hondbóltsdeildunum um vikuskiftið. Landsliðsvenjararnir hava boðsent fleiri av spælarunum til venjing.

Dia Midjord, landsliðsvenjari hjá monnum, hevur tikið hesar spælararnar út:

Esbern Patursson, Dánjal Tórgarð og Levi Nybo, H71. Tony Weyhe og Regin Petersen, KÍF. Hans Áki Dal-Christiansen, Kyndil. Sjúrður Thomassen, Finnur Hansson, Heini Hanusarson og Ári E. Dam, Neistin. Jóannes Prestá og Marius Joensen, StÍF. Bjarti Hansen, Jóen Pauli Høgnesen, Áki G. Olsen og Sámal Jákup Djurhuus, VÍF. Rókur Akralíð, Odense. Tróndur Kragesteen og Tummas Pauli Hanusarson, Holte.

Claus Rasmussen, landsliðsvenjarin, hevur tikið hesar spælararnar út:

Durita Christophersen, Durita Ljósstein, Durita Mikkelsen, Edith Hansen, Ella Petersen, Una Olsen, Joan Midjord Joensen og Judit Hansen, Stjørnan. Agnas Olsen, Elisa Leo, Viviann Petersen, Heidi Joensen, Liljan Durhuus, Tóra Seloy og Halla Midjord, VÍF. Erla Eliasen, Aalborg. Súsanna Petersen, Randi Wardum og Anja Heinadóttir, Kyndil. Fríða Petersen, Ruth Mohr Heen, Louisa Andreasen, Katrin Dam á Neystabø, Ása Dam á Neystabø, Marjun Danberg, Unn Kragesteen og Unnur Danielsen, Neistin. Bára Berthelsen, StÍF. Sarah Ann Bjarnadóttir Thomsen og Simona Petersen, Tjaldur. Bára Mortensen, Svava Vestergaard og Una Egilsdóttir, VB. Ninna Johansen, Virum.

*- uni*

Fríggjadagin, 5. november:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | ÍF – Fleyr | Kambsdalur | Klokkan 19.30 | Menn |

Leygardagin, 6. november:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | SÍ – Fleyr | Sørvágur | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | TB – Mjølnir | Trongisvágur | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| FLOGBÓLTUR | Ternan – KÍF | Toftir | Klokkan 15.00 | Kvinnur |
| SVIMJING | Pál Joensen, 400 m | Stokkholm | Seinnapartin | Menn |

Sunnudagin, 7. november:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| FLOGBÓLTUR | Mjølnir – TB | Klaksvík | Klokkan 15.00 | Menn |
| SVIMJING | Pál Joensen, 1500 m | Stokkholm | Seinnapartin | Menn |



*Pál Joensen skal nú aftur dystast við franska Sebastien Rouault*

# Joensen vs Rouault

**SVIMJING Pál Joensen var 1,73 sekund aftan fyri Sebastian Roualt í evropameistarakappingini í 1500 metra frísvimjing. Nú skulu teir aftur svimja móti hvørjum øðrum**

Uni Holm Johannesen

– Aftaná stórdystin í Budapest í summar, sleppa vit at síggja næsta partin av Rouault vs Joensen. Í einum av bestu dystunum í evropameistarakappingum var Pál Joensen á odda fyrstu 1350 metrarnar, men Rouault vann við einum sekundi.

Soleiðis skrivar Tom Willdrigde á Speed Endurance Swimming Blog. Hann gleðir seg til dystin millum Pál Joensen og Sebastian Rouault undir World Cup í Stokkhólmi um vikuskiftið.

Pál Joensen tekur fyri triðju ferð eftir sjey døgum lut í World Cup-kapping. Fyrst var hann í Berlin, síðan Moskva og nú Stokkholm.

Vágbingurin svimur 400 metra frísvimjing í morgin, og 1500 metra frísvimjing sunnudagin.




*Sebastien Rouault vann gull í Budapest*

## Aftur Biedermann

Paul Biedermann, Týskland, verður aftur millum mótstøðumenninar í 400 metra frí. Biedermann vann á Páli í Berlin seinasta vikuskiftið.

Yannick Agnel, Frakland, verður eisini við. Hann vann á stevnu í Genova seinasta vikuskiftið við somu tíð, sum Biedermann vann við í Berlin.

Biedermann og Agnel bardust um gullið í 400 metra frí í EM í Budapest í summar, so teir eru favorittar at vinna í morgin.

Sunnudagin fer slagið helst at standa millum Sebastian Rouault og Pál Joensen.

Birita Debes og Magnus Jákupsson taka eisini lut á stevnuni í Stokkhólmi. Tey venja miðvíst fram móti norðurlendsku juniormeistarastevnuni í Kastrup í desember.

*uni@sosialurin.fo*